# BØNARLØTAN

APRÍL 2024 39. árg.

*2. páskadagur* *Lukas 22. 46-71*



## ZAREPTA

Várlegan 2024 fyri fólk við breki verður 26-28. apr. Heitið á leguni er *Lívsgleði og rørsla*. Tilmelding: varlegan@zarepta.fo. Kunning: Kári Skýlindal 504544. Tørvur er á starvsfólki.

## FILIPSOYGGJAR, Nayba, NTM

### Liz og Ragnar Niclasen

Kankanaey samkomurnar høvdu samfelagsmøti um páskirnar. Trúgvandi ymsastaðni frá gleddust um at savnast. Hetta er einasta hovi hjá fleiri teirra at síggja hvørt annað. Liz hevði ikki møguleika at luttaka vegna sjúku og aðrar umstøður har. Biðið um grøðing, og at vit kunnu arbeiða sum vanligt í verkinum her.

**KRINGVARPIÐ**
7. apr. kl. 17 útvarpsmøti, Ebenezer
7. apr. sjónvarpsandakt, Jóhan við Neyst

**EVANGELISKA RØDDIN á radio.fo (meir á www.evr.fo)**
Sunnukv. kl. 21.00......Kelduvaðið (endursent hóskv. kl. 21)
Týskv. kl. 21.00..........Á torginum (endursent sunnud. kl. 12.30)

## *2. Týsdagur* — *2. Mós. 32. 1-14*

**ATLANTIC MISSION**
Juvel II liggur í Randers til 7. apr. Biðið, at Harrin virkar við anda og kraft. Skráin sæst á www.atlanticmission.fo




**DANMARK, Kolding**
**Anne og Jan Zachariassen**
Eg fari til Texas í dag at luttaka, tá víðagitni Jesus-filmurin fyri deyv verður sýndur. Eg verði heima aftur 10. apr.

**USA, Nebraska, Ethnos 360**
**Rachel og Peter Hansen**
2-6. apr. verða leiðslufundir í Arizona fyri flogførini hjá NTM. 13-26. apr. verða leiðarafundir í Tailandi fyri lond í fjareystri. Biðið um vísdóm og Harrans leiðslu í avgerðum.

## *3. Mikudagur* — *1. Tess. 1. 1-10*

**SENEGAL, Dakar**
**Marion og Hans Arni Jensen**
**Ryan 15**
Vit verða í Guinea 3-11. apr. og vitja eisini í Tarensa í tveir dagar. Marion skal m.a. ráðgeva fólki, ið læra eitt ættarbólkamál. Biðið, at neyðug hjálp verður veitt, og at starvsfólkið har verður

eggjað. Familjan, ið hevur ábyrgdina av gistingarhúsinum í Dakar, noyddist heim í longri tíð. Ein familja hjálpir nú í tveir mánaðir – biðið Harran leggja øðrum á hjarta at hjálpa.

**ONGLAND, European Christian Mission**
**Dorit og Simon Marshall**
Harrin hevur varðveitt og signað ferðirnar hjá Simon. Í apr. verður hann í Póllandi, Týsklandi, Kekkia og Niðurlondum, har hann skal hitta trúboðarar.

## *4. Hósdagur* — *2. Mós. 32. 15-35*

**FØROYAR**
**Else og Poul Johan Djurhuus**
Poul Jóhan er við Juvel II í Randers fram til 7. apr. Boðað verður í gongugøtuni, møtir verða í leigaðum hølum, og fólk verða boðin til sangløtu umborð. Elsa er nú opererað í báðum knøum.



**Birgit og Svenning av Lofti**
Svenning er við Atlantic Mission í Randers fram til 7. apr. og verður síðani har í nakrar dagar.

**– Anna Maria og Rógvi Joensen**
**– Khuldah og Sámal Mikkelsen, Josva 14, Ester 13, Samuel 9**
**– Dora og Niels Pauli Nónstein, Andreas 14, Kristina 13**
**– Danjal og Synnøve av Rana, Anna Emilie 9, Lukas 3**

## *5. Fríggjadagur* — *Sálm. 130 og 131*

**FØROYAR**
**Vanja og Svein í Prestgarði, Terji 11, Petra 10**
Mamma flutti heim til Harran 8. mars. Noregsferðin í mars varð

signað, og Harrin virkaði. 5-7. apr. havi eg møtir saman við norðmonnum í Frigstad. 23. apríl fari eg til Drammen, har Vision Norge tekur upp vitnisburð og sang. Soleiðis ber til at røkka útivið eina mió. menniskjum við evangeliium.

**– Rutt og John í Skemmuni**
**– Anna og Símun Pætur á Torkilsheyggi**

**USA, North Carolina**
**Charlotte, Calvary Church**
**Gudny og John Munro**

Møtini um páskirnar verða vanliga væl vitjað, og eisini koma nógv fólk, sum ikki vanliga ganga á møti. Biðið um ávøkst.

**ONGLAND, Cornwall**
**Anna og David Rodda**



*Vinir Jesusar* er lítil bólkur av trúgvandi, sum pastor Musa og Augustin leiða við tí endamáli at stovnseta samkomur millum saafi fólkið. 5. apr. hava tey ein dag við bøn og føstu fyri djørvum vitnum í ymiskum saafi bygdum. Fundur verður í Onesimusarhúsi, har undirvíst verður í at røkka út til bygdirnar.

## *6. Leygardagur* — *1. Tess. 2. 1-20*

**DANMARK**
**Anna og Hans Djurhuus**



Føroyskt møti verður 6. apr. kl. 19 í Bethaniakirkjuni, Dag Hammarskjøldsg. 2A, Aalborg. Biðið fyri møtinum.

**OM, SUÐURAFRIKA, Mamelodi Aids Hope**
**Tanja og Kurt Abrahams**
**Hanna 0**

Í des. 2022 søkti Tanja um visum at verða verandi í Suðurafrika, men hevur einki hoyrt aftur enn. Kurt kann í fyrsta lagi søkja um visum at sleppa til Føroya, tá ið hon hevur fingið sítt. Biðið, at henda tilgongdin gongur skjótt og væl.

## *7. Sunnudagur* — *2. Mós. 33. 1-23*




**OM, LOGOS HOPE, TeenStreet**

Tilmeldingarfreistin til summartoymini hjá OM er 15. apr. Tvey toymi verða í summar: Tey 15-18 ára gomlu fara til Póllands 2-10. aug. at arbeiða við ukrainskum flóttafólkum. Tey yvir 18 ár fara til Albania 27. juni - 9. juli at arbeiða við samkomum har. Ársfundurin hjá OM Føroyum verður 22. apr. kl. 19 á Spinnarínum í Klaksvík.

**PAPUA NÝGUINEA, Sorimi (fj.arb.)**
**Carol og Poul Joensen**

## *8. Mánadagur* — *1. Tess. 3. 1-13*

**ÍSLAND, Reykjavík, Akurinn**
**Rósa og Jógvan Purkhús**
**Akureyri, Sjónarhæð, Ástjørn**



Biðið fyri tveimum gentum, sum tóku ímóti Jesusi á ungdómsleguni í fjør. Biðið, at nógv børn og starvsfólk koma til Ástjørn, og at virksemið kann halda á, inntil Jesus kemur aftur.

**FØROYAR**
**Shamila og Høgni Johannesen**



STEVN er byrjað við umleið 100 luttakarum. Nýtt lið byrjar helst eisini í apr. Biðið, at Harrin vegleiðir, nú so nógv er sett í verk.

*Í dag fyllir Ryan Jensen 15 ár

## *9. Týsdagur* — *2. Mós. 34. 1-17*

**SENEGAL, Tongia**
**Lív Poulsen**

Eg eri heima og fari aftur til Senegal um hálvan apr. Ungi umsetarin byggir hús; vónandi verða tey liðug, áðrenn regntíðin byrjar í juni. Biðið um frið og semju í landinum, nú forsetaval var í mars, at ferðin til Senegal gongur væl, og at vit framhaldandi sleppa at arbeiða her.

## *10. Mikudagur* — *1. Tess. 4. 1-18*

**MEKSIKO, Mixtec, Oaxaca**
**Inga McKendry**



Eg undirvísi á málskeiði á Moorland bíbliuskúlanum. Sue, starvsfelagin, skal til onkolog í USA 10. apr. Biðið, at krabbin ikki er virkin. Arbeiðið við mixtec umsetingini heldur fram, hóast nakað seinkað. Vit báðar eru uttanlands, men nakað verður gjørt um netið.

**NTM - FØROYAR**
**Noomi og Eli Christiansen**
**Hadassa 13, Tabita 10, Debora 8, Natan 5**

## *11. Hósdagur* *2. Mós. 34. 18-35*



**DANMARK, Skovlunde**
**Sara og Andrew Berghamar**
**Noah 17, Lydia 7**

Vit gleðast um at kunna fylgjast við fólki, sum eru nýggj í trúnni ella søkjandi. Fleiri vórðu doypt um páskirnar. 11-12. apr. skipa vit fyri *Prep-hjúnabandsskeiði* í samkomuni. Biðið, at Harrin signar og styrkir hjúnini, ið luttaka.

**DANMARK**
**Glostrup Frikirke**

## *12. Fríggjadagur* *Sálm 132 og 133*



**DANMARK, Kristnastova**
**Sólva og Jákup Hansen**

Biðið, at Harran reisir upp fólk at taka við starvinum í Kristnastovu at tæna menniskjum og leiða arbeiðið í og út frá húsinum, og at vit sum hjún kenna leiðslu Harrans!



**Susan og Øssur Berghamar**

Vit bæði eru ikki ung longur; tað eru tí ikki vit, sum taka tey tyngru tøkini í sambandi við verkið í Kristnastovu – tað gera onnur trúføst fólk, tíbetur. Men vit royna at stimbra, stuðla og vitja, har vit merkja, at tørvur er. Biðið fyri okkum. berghamar@kristnastova.dk

## *13. Leygardagur* *1. Tess. 5. 1-28*



**FØROYAR**
**Unn og Jógvan Zachariassen**
Frá 13. apr. leiði eg, saman við øðrum, Billy Graham-møtini í Krakow í Póllandi. Vit vænta eini 16.000 fólk, har trúgvandi fólk eisini bjóða vantrúgvandi vinum við at hoyra evangeliið. 26. apr. verða Billy Graham-møtir í Porto, Portugal, har eg aftur eri við at leiða. Vit vænta eini 7.000 fólk. Biðið fyri fyrireikingunum og um, at Harrin leiðir mangar sálir frá deyða til lív.



**– Elin og Jógvan Jacobsen**
**– Lis Zachariassen**
**– Annika og Poul Færø**
**– Anna og Óli Steinberg**
**– Maria og Jens Bech**

## *14. Sunnudagur* *2. Mós. 35. 1-19*

**USA, New Tribes Mission, Alabama**
**Judy og Óli á Grømma Jacobsen**
Vit verða í Tailandi 14-28. apr. á stevnu, ið er 4. hvørt ár fyri NTM leiðarar og ráðgevar í Asia. Eisini verða fundir við NTM leiðsluna. Síðani vitja vit systkin míni og vinir í Danmark. Vit verða í Føroyum 6-28. mai.

**FRANKARÍKI, Nantes, OM**
**Cecile og Jóhannis Mortensen**
**Sarah 13, Leah 10, Abigail 5**
Møti í grannalagnum verður 14. apr. Jóhannis og Abigail verða í Føroyum fram til 1. mai. Samkomuvikuskifti verður 2. mai. Takk fyri bønir.

**Elam Ministries, Evropa**
**Margretha Højgaard Poulsen**

## *15. Mánadagur* *Matt. 8. 1-17*



**ONGLAND, Birmingham, OM**
**Claire og Craig Niclasen**
**Rebekah 16, Lydia 14**
Mission Partners Network Forum verður 15-18. apr. 121 fólk úr 49 missiónsfelagsskapum í Evropa koma saman at viðgera persónligan stuðul til missión. Claire er við til at fyriskipa og leiða. Biðið fyri luttakarum og felagsskapum, at Gud talar til teirra, um fleiri arbeiðsfólk til akurin, at evangeliið verður boðað, og at Jesus verður dýrdargjørdur.

**DANMARK, Hirtshals, Malta**
**Ansa og Arnold Mortensen**
**Ewelina 14**
Biðið áhaldandi fyri sunnudagsskúlanum, sum savnar alsamt fleiri donsk børn, og fyri ungdómsmøtunum, at tey ungu taka ímóti Harranum.

## *16. Týsdagur* *Lukas 23. 1-19*

**GRØNLAND, Nuuk**
**Naalakkap Jiisusip Oqaluffa**
**Hans Sivertsen**



Aftur í ár bjóða vit 30-35 børnum og 30-35 ungum á legu í Naalersitaq. Síðstu árini er Sofus Gregersen komin við toymi av ungum at hjálpa, men í ár

ber honum ikki til, og tí leita vit eftir fólki ella hjúnum at avloysa. Eisini er sera stórur tørvur á hjúnum, sum kunnu hjálpa til við t.d. matgerð og reingerð.

## *17. Mikudagur* *Lukas 23. 20-34*

**ÍRLAND, Global Serve International**
**Guðrun og Ivor Tutty**

Samkoman veksur hvørja viku, og útbyggingin av samkomubygninginum gongur væl, hóast nakað seinkað. Biðið, at arbeiðið eydnast, og at fígging verður í lagi, so bygningurin verður liðugur sum ætlað í sept.

## *18. Hósdagur* *Lukas 23. 35-56*



**ITALIA, Molise**
**Heidi og Regin Guttesen**
**Trisha 12, Emma 7**

Býurin Campobasso við 60.000 íbúgvum liggur stutt frá okkum. Vit vilja náa býin við evangeliinum. Biðið fyri hesum.

**SVEIS, Versoix, Redeemer Grace**
**Jeanette og Solomon Magura**
**Reuben 10, Micah 10**

## *19. Fríggjadagur* *Lukas 24. 1-23*

**MEKSIKO, Michoacán, Puruandiro**
**Hansy og Martin Tuohy**
**Victoria 17, Emma Grace 16, Jónatan 14, Markus 12, Evita 9, Joy 7**



Biðið fyri *Pescadores* (fiskimenn). Hetta eru eini 10 í samkomuni, sum vitja á sjúkrahúsi fríggjadagar at tosa við, biðja fyri og bjóða bæði sjúklingum, familju hjá innløgdum, og starvsfólki cappuccino. Teir stuðla og bera fólki í kreppu evangeliið.

## DANMARK, Odense
## Árni Helmsdal

Um 100 fólk komu til 40 ára hátíðarhaldið frá kl. 10 á morgni til 10 á kvøldi. Signingarríkt! Fríggjadagar seinnapart evangelisera vit á gøtuni. Biðið um opinleika.

***20. Leygardagur*** ***Lukas 24. 24-53***

## INDONESIA
## Krissy og Daniel Hansen
## Zephaniah 3, Selah Rose 1

Vit vórðu eggjað av vitjanini í Føroyum. Tað var signað at vitja familju og vinir umframt at hitta fleiri, ið vit ikki kendu. Vit fara aftur til Indonesia fyrst í mai. Biðið fyri ferðini og fyrireikingunum, ið skulu gerast, áðrenn vit fara aftur til Asmat ættarbólkin.

***21. Sunnudagur*** ***2. Mós. 35. 20-35***

## GRØNLAND, Qaqortoq
## Marjun og Páll Poulsen



Biðið Harra skurðarins, *Luk.10.2,* senda okkum leiðarar til legu 3 og 4, frá 9-25. juli. Somuleiðis, at flutningstól okkara, báturin Juvel, er liðugt umvældur og royndarsigldur væl og virðiliga at fara aftur til Grønlands við Sandfrakt fyrst í mai.

## *22. Mánadagur* — *Matt. 8. 18-34*

**TÝSKLAND, Hückeswagen, Ethnos 360**
**Wina og Benjamin Hansen**
**Noah Elias 12**



Stórur tørvur er á fólki í tænastu kring allan heimin. Vit samskipa tænastuna hjá teim ungu, ið eru farin út við NTM/ Ethnos 360. Biðið og takkið Gudi, at røttu fólkini verða send í rættari tíð.

## *23. Týsdagur* — *2. Mós. 36. 1-19*



**TURKALAND, Istanbul**
**Annika og Stephen Everett**

Annika hjálpir í bókhaldinum hjá turkiskt leidda bólkinum Ümit (Vón), ið stuðlar samkomum at hava *outreach*, serliga á sumri. Eisini eru tiltøk á netinum um t.d. evangelisering og leiðslu fyri ung úr turkiskum samkomum. Vanliga luttaka 60-80 fólk, sum so seinni kunnu fara á *outreach*. Vit geva grundlæru, serliga tí so mangir trúboðarar verða útihýstir. Minnist árliga evangeliserings- og bønartiltakið 23. apr. á oynni Büyük Ada út fyri Istanbul.

## *24. Mikudagur* — *Matt. 9. 1-13*

**PAPUA NÝGUINEA, Mengen**
**Annika og Simon Flanagan**
**Nya 15, Noah 14, Karis 10, Judah 8, Ethan 6**

Vit eru í Norðurírlandi og vitja familju, vit ikki hava sæð í fimm ár. Síðani vitja vit samkomur í Edinburgh. Biðið, at oyrnaskurð-viðgerð hjá Noah í USA eydnast væl, at Gud varðveitir okkum á

ferðunum til USA og aftur til PNG, og at dyr verða opnaðar fyri evangeliinum í Malvoni, Mile og Pakia.

## *Flaggdagur* *2. Mós. 36. 20-38*

**PAPUA NÝGUNEA**
**Lili og Brian Poulsen**
**Elliot 7, Jude 5, Evelyn 3, Olivia 0**
Vit kanna nú, saman við Shaiebly-familjuni, ættarbólkin Qaqet, har vit møguliga fara at búgva og boða evangeliið. Vit kanna m.a., hvussu slepst til og frá, og hvussu útgerð og vørur fáast hagar.

*Í dag fyllir Markus Tuohy 12 ár

## *Dýri biðidagur* *Sálm. 134 og 135*

**FILIPSOYGGJAR, Puerto Prinsessa**
**Cathy og Jógvan J. Rasmussen**
Vit eru í Italia allan apr. og verða í Føroyum síðstu tríggjar vikurnar av mai í sambandi bókaútgávu hjá Óla á Grømma.

## *27. Leygardagur* *Matt. 9. 14-26*



**GRØNLAND**
**Juvel II**
**Gull-Britt og Karsten Hansen**
Vit hava vitjað samkomur í vetur og greitt frá verkinum við Juvel II í Grønlandi. Enn vantar nakað av manning til summarið: maskinfólk, sangarar og tónleikarar. Biðið, at eisini ung koma við at boða evangeliið fyri unga ættarliðnum í Grønlandi. Kunning: Karsten á 285007.

**GRØNLAND, Qasigiannguit**
**Solveig og Daniel Kinda**

**VENESUELA, Puerto Ordaz**
**Nurimar og Jóhannus Frants Poulsen**

## *28. Sunnudagur* — *2. Mós. 37. 1-16*



**JAPAN**
**Shino og Hallur Mortensen**
**Kano 14, Nana 12, Louie 10, Rio 4**
Biðið fyri okkara *English Café* fyri vaksin. Har eru eini 6-8 uttanífrá, sum koma regluliga, og onnur, ið koma av og á. Fyrst vilja vit knýta vinabond og opna samkomuhúsið. Seinni vóna vit at hava bíbliutíma við onkrum teirra.



**FILIPSOYGGJAR, Naplud (f)**
**Monika og Tim Sharp**
**Hanna 15**

## *29. Mánadagur* — *Matt. 9. 27-38*



**PAPUA NÝGUINEA, Kovol**
**Natalie og Philip Hansen**
**Louis 6, Timon 4**
Nú koyra generatorar, akfør o.a. aftur sum vanligt eftir brennievnistrot síðstu mánaðirnar. Flogfør og tyrlur okkara fáa tó enn ikki Jet A brennievni og mugu tí brúka av goymsluni. Biðið fyri flogferðslu- og trúboðaratoyminum. Vit takka Gudi fyri, at Stanley, starvsfelagin, kom til Kovol hóast hesar avbjóðingar.

**TAILAND, Chiang Mai**
**Corine og Sørin Joensen**
**Aron 12, Noah Kristian 10**
Vit fara aftur til Tailands í juli. Sørin ætlar at vitja í Føroyum í mai.




| | |
|---|---|
| Útgevari | KBS (Kristniboðssambandið) |
| Blaðnevnd | Róland í Skorini, ábyrgd, Ernst Olsen, Elsa í Skorini, Randi Østerø, Dóra D. Gaard, Kristianna J. Heinesen, Óli Jákup Jacobsen, Jónvør Christiansen, Durita Olsen, Barbara og Ragnar Vest og Sigurð Ó. Vang. |
| Avgreiðsla | Óla Hendrik av Fløtum, tel. 227057 |
| Uppseting | Grafikmaster, tel. 502022 |
| Myndasavn | info@grafikmaster.fo |
| Prent | Føroyaprent, tel. 314555 |
| Teldupostur | prayerservicefo@gmail.com |
| Heimasíða | www.kbs.fo |

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705



©KBS. Loyvt er at endurgeva tilfarið, um keldan verður nevnd.

## BÓKATÆNASTAN

Biðið fyri bókatænastuni hjá Leirkerinum og Logos Hope!

## HARRIN ER HIRÐI MÍN

**154 síður 200 kr.**

Phillip Keller, f. 1920 í Eysturafrika, var royndur seyðamaður og visti, hvat tað var at verja eitt seyðafylgi móti ymiskum vandum. Hann dregur nútíðar sjónarhorn inn í gitnasta sálmin, sum nakrantíð er skrivaður, og megnar við innliti sínum at ugga, styrkja og flyta myndina yvir á kærleika og umsorgan, sum Góði Hirðin hevur fyri fylgi sínum.
Leon Andreasen týddi.




FORLAGIÐ LEIRKERIÐ

Bílegging á www.leirkerid.fo
Kráargøta 36 • Klaksvík
Tel. 718191 • leirkerid@leirkerid.fo